

# Fólkafloksungdómur fyri skrásettum parlag

Tá viðgitna 266b varð samtykt á tingi, var tað bara Poul Michelsen úr Fólkaflokkinum, sum tók undir við málinum. Men nú fær hann stuðul frá forkvinnuni í Fólkafloksungdómi, Bjørk Olsen Vágaportalurin vísir til kjakið á www.kjak.fo, har forkvinnan í Fólkafloksungdómi, Bjørk Olsen (myndin) sigur sína hugsan um, hvat hon heldur er týðandi á komandi løgtingsvalinum 2008. Tey eru, at

- allir miðnámsskúlanæmingar studning, óansað aldur
- skattafría útleigan til privatpersónar
- miðnámsskúladepil (í Havn og heilt skjótt, so næmingarnir í Hoydølum sleppa undan at ganga og njósa allan dagin, tí tey ikki tola svampin)
- loyvt, skrásett parlag
- javnstøða millum menn og kvinnur í politikki.



# Rokaligt hjá løgregluni

**Leygarnáttina og í sunnunáttina hevur løgreglan havt nógv at gera tí nógvir mans vóru blandaðir upp í harðskap og bardaga**

Løgreglan hevði fullar hendur leygarnáttina og sunnunáttina.

Nógv fólk er í Havn hvørt vikuskifti og tá ið dansistøðini lata aftur, savnast mangan heilt nógv fólk í miðbýnum í Havn.

Í hesum sambandi varð løgreglan boðsend leygarnáttina, tí at hópbardagi hevði tikið seg upp í miðbýnum, har einir 20 mans vóru uppi í.

Enn veit løgreglan ikki, hvussu nógv liggur í hesum og, hvussu umfatandi hetta er, tí í fyrstu syftu eru nøvn skrivað niður og so verða avhoyringar tað næstu tíðina fyri at staðfesta, hvat fór fram og, hvussu umfatandi tað í veruleikanum var.

Men onkur er sligin og í tí sambandi var ein maður tikin á støðini at sova og hann varð sleptur út aftur um dagin.

Tvær aðrar ferðir leygarnáttina varð løgreglan boðsend til harðskap. Eisini í tí førinum var brennivín uppi í og tískil bíðar løgreglan av avhoyringunum til seinni.

Eisini sunnunáttina hevur løgreglan havt tríggjar tilburðir um harðskap. Í tveimum førum mátti ein maður á skaðastovuna til viðgerðar eftir at vera sligin. Í tí eina førinum er ein maður sligin so hart, at hann helst hevur brotið nøsina.

Løgreglan sigur, at summir av bardagamonnunum eru gamlir kenningar, men tað er ikki altíð lætt at avhoyra fullar menn og tí bíða avhoyringarnar ofta til aftaná.

Løgreglan hevði eisini liggjandi gest sunnunáttina. Tað var ein útlendskur sjómaður, sum var so ólátaður í brennivíni, at hann varð tikin við á støðina at sova rúsin av sær, áðrenn hann varð sleptur út aftur sunnudagin.

Harafturímóti var stak friðarligt mánanáttina, sum altso var náttin tin nýggjársaftan. Dansistøðini vóru stongd og tað merkist beinanvegin aftur á náttarlívinum, so løgreglan hevði tað stak friðarligt. Men hon slapp ikki heilt undan kortini, tí hon mátti eftir einum manni í Havn, sum var farin at vitja fólk, men hann var óynskur gestur og húsfólkið ringdi tískil eftir løgregluni, sum tók mannin við sær á støðina at sova.

-áki-

# Nøktandi fyri okkum

**Vit hava onki mist, men tað er spell, at tað skuldi ganga so long tíð, áðrenn ein loysn varð funnin.**

Hetta er ein loysn, sum kann brúkast og tað eru vit nøgd við.

Joel undir Leitinum á Samskip, fegnast nú um, at Vinnumálaráðið nú hevur funnið eina loysn á trupulleikanum við skipum, sum ES ikki hevur góðkent og sum vit umrøða í greinini »Fyribils loysn á stórum trupulleika.«

Tað er langt síðani, at ES gjørdi føroyskar myndugleikar varugar við, at viðurskiftini vóru ikki í lagi og beint fyri jól, tók Sosialurin málið upp og vísti á, at vandi er fyri, at nakrar føroyskar fyritøkur fara at missa tíggjutals milliónir.

Tá varð ein fyribils loysn funnin og tað fegnast Joel undir Leitinum um tú hetta er ein loysn, sum er nøktandi fyri tey.

- Men hetta er ein gamal trupulleiki og spurningurin er, hví vit skulu bíða til heilt uppundir jól, til ein loysn var funnin.

Hann staðfestir, at tað er í evstu løtu, at ein loysn varð funnin, tí tað er nú, at tað stóra virksemið byrjar og varð ongin loysn funnin nú, fór hetta virksemið fyri skeytið.

Hann staðfestir eisini, at Samskip hevur ongar ordrar mist av støðuni, sum tók seg upp.

Men í aðrari grein hava vit samrøðu við Johan Dahl, sum hevur frystigoymsluna í Vági og hjá teimum kom loysnin nakað seint.

-áki-

# Tóm blikk fyri 1,2 mió

**Føroyingar hava stórar pengaupphæddir goymdar í kjallarum og í hjallum runt um í landinum, ella tær verða rætt og slætt tveittar burtur**

EINNNÝTISÍLØT

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Meiri enn tveir triðingar av øllum einnýtisíløtum við øli og sodavatni, sum verða keypt í Føroyum, verða tveitt burtur og verða sostatt ikki latin innaftur.

Tað upplýsir Heilsufrøðiliga Starvsstovan á heimasíðu síni.

Hvørja ferð eitt blikk, ella okkurt annað einnýtisílat av øli ella sodavatni, verður keypt, verður ein ávís upphædd goldin í panti.

Men at so fá av teimum tómu íløtunum verða latin innaftur, merkir ikki bara, at nøgdirnar av burturkasti á brennistøðunum veksa.

Tað merkir eisini, at Føroya fólk hevur mist 1,2 millión krónur, sum tey høvdu fingið aftur í panti, vórðu íløtini latin inn aftur, sigur Starvsstovan.

Ístaðin enda pengarnir hjá seljarum og innflytarum.

### Tilfeingið til spillis

Uppgerð vísir at frá í juli í fjør og tríggjar mánaðir fram vóru 30 % av einnýtisíløtunum latin innaftur. Mest kemur aftur av íløtum úr metali og glasi, eini 45%, men einans 5-10% av plastíløtunum verða latin inn aftur.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan heldur, at ein orsøk kann vera, at fólk mugu hava tíð til at venja seg við, at einnýtisíløtini skula latast inn aftur og kanska eru øll ikki varug við, at pant er lagt á einnýtisíløtini.

Ein onnur orsøk kann vera, at nógv einnýtisíløt eru ikki latin inn aftur enn, men liggja í hjøllum, kjallarum og aðrastaðni runt um í landinum.

- Tað er vanligt at lata fløskur inn við serlig høvi, eitt nú á jólum og á Ólavsøku.

Men tað er eisini sannlíkt, at ein orsøk til, at so fá einnýtisíløt úr plasti verða latin inn aftur, er, at tað er ikki pant á nógvum einnýtisíløtum úr plasti og tí verða tey helst bara blakað burtur.

Tá ið íløt verða tveitt burtur, enda tey á brennistøðum og eru við til at økja um trupulleikan við vaksandi nøgdum av burturkasti.

Ein annar trupulleiki er, at summi einnýtisíløt eru úr aluminium, ið smeltar og setir seg fast í ristirnar í brenniovninum.

- Harafturat fer tilfeingið til spillis, sum eigur at verða endurnýtt. Verða aluminiumsíløtini ikki endurvunnin, skulu nýggj aluminiumsíløt gerast við nýggjari rávøru og tað elvir til óneyðuga nýtslu av rávøru og orku.

- Tí er umráðandi, at einnýtisíløt ikki verða koyrd burtur, men latin inn aftur til endurnýtslu, sigu Heilsufrøðiliga Starvsstovan.




*Stórar pengaupphæddir liggja goymdar í kjallarum og í hjallum runt um í landinum, ella tær verða rætt og slætt tveittar burtur*